Starvslýsing

# Søluleiðari til Posta

Sum liður í at staðfesta Posta sum eina nýmótans og effektiva fyritøku, verður søkt eftir søluleiðara at seta skjótast gjørligt.

**Søluleiðarin skal:**
Uppgávan hjá søluleiðaranum er at leggja til rættis, samskipa og menna søluarbeiðið hjá Posta, umframt at selja flutningstænastur til stórkundar. Afturat er menning av vørum og tænastum ein annar partur av arbeiðinum. Seinasta árið hava vit, sum part av marknaðartillagingini av fyritøkuni, arbeitt við at fokusera okkara vøru- og tænastuskrá. Søluleiðarin fær høvi at leggja síðstu hond á hetta arbeiði.

**Títt íkast til okkara:**
Tú kanst vísa á itøkilig úrslit frá líknandi starvi. Tað er títt eyðkenni, at tú ert ágrýtin og røkkur teimum málum, tú setur tær. Tú dugir væl at samskifta og hevur lætt við at skapa varandi sambond við kundar og starvsfelagar. Tú sært fleiri møguleikar enn forðingar, og tín arbeiðsháttur er miðvísur og vælskipaður. Tú dugir væl at leggja arbeiðið til rættis, hevur royndir við CRM og hevur eisini eina greiða fatan av, hvussu KT kann nýtast í søluarbeiðinum.

**Okkara lyfti til tín:**
Umframt kappingarføra løn bjóða vit tær eitt jaligt arbeiðsumhvørvi og eitt avbjóðandi starv. Tú kanst vænta, at tín ávirkan fer at gera stóran mun á heildina.

**Umsóknir:**
Posta umsóknir við avritum av viðkomandi skjølum til:
Posta
Starvsfólkadeildin
Óðinshædd 2
100 Tórshavn
ella til posta@posta.fo
og vera okkum í hendi í seinasta lagi hin **19.08.09**

**Spurningar:**
Spurningar um starvið kunnu setast Sofusi Clementsen, stjóra, á tlf. 23 61 31.

SENDISTOVAN

Posta er nýggja navnið hjá Postverki Føroya. Við hesum verður broytingartilgongdin frá almennum stovni til vinnurekandi tænastufyritøku staðfest í navni og útsjónd. Visiónin hjá Posta er, at veita tryggastu, lættastu, mest álítandi og tíðarhóskandi flutningstænastur umvegis allar viðkomandi kanalir. Virðini, sum vit arbeiða eftir eru: Virðing, Vilji og Víðskygni.

Posta

62°N airport hotel

www.62n.fo

- gisting
- matstova
- skeið
- fundir
- føðingardagar
- brúdleyp
- ferming
- matur út úr húsinum
- móttøka

62°N airport hotel er eitt nýmótans gistingarhús við øllum nýmótans hentleikum. Vit veita heildarloysnir til øll tiltøk bæði fyri vinnu- ella privatkundan. Vit veita viðskiftafólki okkara ein dygdargóða tænastu alt samdøgrið.

...brúkið okkum, vit eru serfrøðingarnir!

62°N airport hotel · Djúpheiðar 2 · 380 Sørvágur · tel: +298 30 90 90 · fax: +298 30 91 · hotel@62n.fo